# Seyðasýning á Skála

**Aftur í ár skipar Skála Ítróttafelag fyri seyðasýning.**

SEYÐASÝNING
*tíðindaskriv*

Seinastu árini hevur Skála Ítróttarfelag á hvørjum heysti skipað fyri einari seyðasølu ella kanska rættari einari djórasølu.

Enn einaferð er tað Ítróttarhøllin í bygdini, sum leggur gólv til eitt tiltak hjá felagnum, og fyrireikararnir vóna, at nógv fólk koma á gátt.

Eins og í fjør vera fleiri tiltøk í einum. Har verður vørutombola, har verður eydnuhjól við føroyskum mati og so verður ein veðrur seldur á amerikanskari uppboðssølu.

Sum ikki einaferð er tað bygdafólki, sum leggur rygg til tiltakið, og í tí sambandi heitir felagið á fólk um at lata lutirnar til vørutombola og eydnuhjóli. Lutirnar kunnu latast inn í ítróttarhøllini leygardagin 1. oktober millum klokkan 15.00 og 17.00. Tey sum ikki tíma í høllina við lutum, kunnu lata teir inn í PW og í Kovanum á Skála og hjá Statoil og Stranda Centrum á Strondum.

# Filmsskúli hjá Klippfisk

**Føroyski filmsverkstaðurin, Klippfisk, fer nú undir kvøldskúlaskeið í filmsgerð**

KLIPPFISK
*tíðindaskriv*



Klippfisk - samstarvið millum Føroya Studentaskúla, Tekniska Skúla, Margarinfabrikkina, Sjónvarpið og Kvøldskúlan - fer nú undir føroyskan filmsskúla. Í lýsing aðrastaðni í blaðnum bjóðar Klippfiskur 9 ymiskar lærugreinir, harav 6 - 7 av lærugreinunum fara at samstarva í felagsverkætlanum. Lærugreinirnar eru leikrit, framleiðsla, leikstjórn, kamera/-ljós, ljóð, klipping og videoeffektir. Undirvísingin er soleiðis løgd til rættis, at tað verður undirvíst í hvørjum faki sær, umframt at tað verður samstarvað um veruligar filmsverkætlanir.

Munurin á skeiðnum í ár í mun til undanfarin ár er tann, at undirvíst verður málrættað í ymisku fakunum. Har tað áður hevur verið undirvíst í øllum undir sama hatti, verður tað í ár undirvíst í einkultum fakum; leikritaskriving, leikstjórn o.s.fr.

Øll tey, sum undirvísa, arbeiða innan fyri film/-video. Fleiri teirra arbeiða í Sjónvarpinum, antin aftanella framman fyri skermin.

Sigga Vang undirvísir í leikriti. Herluf Sørensen og Sigga Vang í framleiðslu. Jákup Veyhe og Jan Berg Jørgensen í leikstjórn. Hans Petur Hansen og Bjørg Mohr Andersen í kamera/-ljósi. Aleksander Gaard Joensen í ljóði. Høgni Heinesen og Thomas Koba í klipping. Og Áki Simonsen og Høgni Heinesen undirvísa í videoeffektum

Harafturat eru tvey skeið. Nevnliga Video - frá a til z - við Áka Simonsen, ið ætlað fólki, ið vil læra alt um at gera video sjálv, og Video fyri ungfólk 12 - 15 ár við Siggu Vang og Jákupi Veyhe

Klippfiskurin hevur rættuliga spent seg út til veturin. Í Klippfiski kunnu 4 upptøkulið arbeiða samstundis, og nýggj útgerð kemur, áðrenn skeiðini byrja. Tað er avmarkað luttakaratal á ymisku skeiðunum, so tað er tann, ið fyrst kemur, ið plássið fær.

Tað hendir annars nógv á føroyska filmsøkinum. Sjónvarpssendingin Agurk hevur eina kapping í løtuni, har treytirnar eru, at fólk skulu gera ein stuttfilm um ótta. Nógv eru tey, ið ætla sær vinningin - eitt kamera fyri uml. 25.000. Ein stór norðurlendsk heimasíða er í gerð, har Føroyar fáa eina føroyska síðu burturav. Henda heimasíðan verður soleiðis háttað, at ungfólk kunnu upploada sínar filmar og síðani fáa ummæli frá professionellum filmsfólki. Norðurlandaráðið og ymisk filmfeløg standa aftan fyri hesa verkætlan. Filmurin "skitna onkið", ið vann 2. plássið í Agurkukappingini í vár, hevur fingið innbjóðingar til ikki færri enn tríggjar filmsfestivalar kring um. Og væntandi verður ein nýggjur norðurlendskur films-summarskúli settur á stovn í Føroyum komandi ár. Tað grør um gangandi fót.



HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL

Aftur í ár stíla vit fyri borðhaldi, dansi, vistarhaldi og flutningi!

JÓLABORÐHALD

Legg saman útferð, jólaborðhald, gisting og dans og tú fært:
eina stóra jólaveitslu!
fyri 595,-
"Surprise-undirhald" undir borðhaldinum
v/ gisting og flutningi úr Havnini

27. nov., 4., 11., (17.) des.:
"All That Rain"
undirhalda

Jólaveitsla og dansur 250,-
Dansur frá kl. 11.00 100,-

Jólaborð til hurðina úr 98,-
Smyrjibreyð 18,-

Vit koyra mat út um allar Føroyar!
- Ring og hoyr nærri ella hygg á www.hotelvagar.fo

......bíleggið í góðari tíð á tel 30 90 90
- avmarkað atgongd!

Ring og vit senda okkara spennandi jólamatskrá!
Jólaveitsla er í døgunum 26. nov., 3. og 10. des. (17. des.)
frá kl. 19.00. Annars fyriskipa vit veitslur eftir avtalu.

HOTEL VÁGAR

Flogfelag Føroya • Sørvágur • tel 30 90 90 • hotel@ff.fo

TEAM85


# Nakinleiki selir eisini í Føroyum

Myndir av berum fólki, eru altíð góð søluvøra, hetta hava lýsingarfólk vita í nógv ár, eisini danska Ekstra Bladet við síni Side 9 pige, og Se og Hør við síni Se og Hør pige, hava skilt boðskapin. Um áhugin fyri nakinleika er størri ella minnið í Føroyum, er ringt at vita. Pornografilógin ger skrásetingar av áhuganum hjá føroyingum eitt sindur trupla. Men í hósdagsútgávuni av internetsosialinum fáa vit greiðar ábendingar um, at føroyingar ikki eru pettið annarleiðis enn onnur fólk, hvat nakinleika viðvíkur.

Á internetsosialinum er mest lisna søga í hósdagsblaðnum tann um bera yvirkroppin hjá Jóannesi Lamhauge, og tann næstmest lisna er um amerikanskar damur í bikini, sum vaska bilar fyri fólk. Niðurstøðan eigur tí at verða, at føroyingum dámar væl at lesa um bæði ber mannfólk og um ber konufólk.

**nud**